# Ársmøtið í Nesvík

TÍÐINDASKRIV:



15.-18. mai skipar Kirkjuliga Heimamissiónin fyri tí vælumtókta ársmøtinum í Leguhúsinum í Nesvík, har nógv fólk úr øllum landinum plaga at savnast. Evnið í ár er Guds kall. Byrjað verður hósdagin 15. mai og hildið verður á til sunnukvøldið 18. mai.

Skráin hevur okkurt at bjóða bæði til børn, ung og vaksin. Ein serstøk barnaskrá er eisini, so meðan foreldur eru til møti og annað, verða børnini ansað í ítrivrúminum og úti, har spælipláss, graslíkisvøllur og ein hylur er at rógva í.

Eins og til vanligu tiltøkini í Nesvík, so verður nógvur sangur á skránni, bæði felags- og kórsangur. Hvørt kvøld er møti, har ymiskir talarar og kór luttaka og um dagarnar eru orðaskifti og frágreiðingar á skránni. Sunnudagin verður eisini skipað fyri einum serligum familjumøti við luttøku av barnakóri.

Talarar á ársmøtinum í ár eru millum annað Marius Jacobsen, Leirvík, Niels Jacob Nielsen, trúboðari, Strendur, Regin Høgnesen, trúboðari, Leirvík, Sverri Kass, Strendur og Bergur D. Joensen, prestur, Argir. Eisini er vitnisburður, orðaskifti og frágreiðingar á skránni.

Nógvur sangur verður eisini á skránni. Byrjað verður til dømis við einum sangmøti, har streingjakórið úr Vágoynni og "Petur Hans Hansen & Thomas Dam" syngja og spæla. Annars verður tað kórið Gleði úr Klaksvík, Taborkórið av Toftum, Thaborkórið úr Fuglafirði, ungdómsbólkurin Prayz og barnakórið úr KFUM & K úr Klaksvík, ið luttaka við sangi.

Cafe við livandi tónleiki er eisini á skránni.

Savnað verður inn til ymisku arbeiðsgreinarnar hjá Heimamissiónini.

Eisini verður høvi at keypa ymiskar kristiligar bøkur og fløgur frá Heimamissiónsforlagnum.

Møtini eru ókeypis. Um ein ynskir at eta og gista í Nesvík, er neyðugt at boða frá luttøku áðrenn.

Leguhúsið í Nesvík fyllir í ár 10 ár. Tað varð vígt og tikið í brúk á Ársmøtinum í 1993, og síðani tá hevur tað verið karmur um ein stóran part av landstiltøkunum hjá Heimamissiónini. Næstan hvørt einasta vikuskiftið í árinum, og alla summarfrítíðina verður Leguhúsið nýtt til barnalegur, ungdómslegur, bygdalegur, skeið og annað, og húsið hevur roynst sera væl.

## Gylta morgunstund

*Gylta morgunstund*
*blítt summarvindin hitar,*
*lívgandi øll smálomb nemur,*
*hvørt eitt strá á bønum litar.*

*Gylta morgunstund*
*vekur sál úr vetrardvala,*
*vermur seg við fyrstu glæmur,*
*skyggjandi úr kavi spæla.*

*Gylta morgunstund*
*speglar lívsins morgunroða,*
*eins og barn at brósti sýgur,*
*lív frá morgunsól vit fáa.*

*Gylta morgunstund*
*við silvitni á tanga,*
*hagasóljan sprettur glað,*
*rósurunnar anga.*

*Gylta morgunstund*
*er Orfeusi at bana,*
*vaknaði úr døgg og dvalu*
*summardáin væna.*

*Gylta morgunstund*
*nú heiðafuglur letur,*
*gloymt er stríð og strev*
*og tann kaldi vetur.*

**Valdemar á Løgmansbø**
apríl 2003

# Nes Sóknar Musikkfelag skipar dýra biðidag fyri 38. musikkstevnuni

TÍÐINDASKRIV

Árliga musikkstevnan hjá føroysku hornorkestrunum verður í ár í Runavík. Luttakandi orkestrini eru 9 í tali, men av tí, at Sørvágs Tónleikarafelag og Vestmanna Hornorkestur í ár spæla saman, verður talan um 8 framførslur. Konsertin verður í ítróttarhøllini í Runavík dýra biðidag. Har vera 4 pallar, og orkestrini spæla 12 minuttir í part. Endað verður við at øll orketrini spæla 2 marsjir saman. Um kvøldið verður veitsla á Svangaskarði kl. 19.

Musikkstevnan verður sett í ítróttarhøllini í Runavík av Rodmundi Nielsen, býráðsformanni kl. 14.

Síðan spæla orkestrini í hesi raðfylgju:
Nes Sóknar Musikkfelag
Sørvágs Tónleikarfelag & Vestmanna Hornorkestur
Harmoniorkestrið G.H.M.
Klaksvíkar Hornorkestur
Havnar Ungdómshornorkestur
Tvøroyrar Hornorkestur
Fuglafjarðar Hornorkestur
Havnar Hornorkestur

Siður hevur verið, at orkestrini skiftast um at skipa fyri hesum tiltakið, sum má metast at vera hæddarpunktið á tónleikaárinum hjá hornorkestrunum. Tað eru í ár 40 ár, síðan Nes Sóknar Musikkfelag byrjaði at spæla, og er tað tí sera hóskandi, at NSM hesa ferð skipa fyri stevnuni.

3 spælarar hava verið við alla tíðina, men umframt tað hevur orkestrið havt stóra tilgongd av ungum spælarum í góðum samstarvi við musikkskúlar og – lærarar. Spælararnir koma úr flestu bygdum í Runavíkar kommunu umframt av Toftum, av Strondum, av Skála og úr Oyndarfirði. Samstarvið millum bygdirnar hevur verið fyrimyndarligt. Við okkara 28 spælarum eru vit eitt av best mannaðu orkstrunum í landinum.

Nes Sóknar Musikkfelag vónar, at nógv nýta høvið til at hoyra góðan og fjølbroyttan horntónleik á konsertini í ítróttarhøllini í Runavík dýra biðidag - 16. mai 2003 kl. 14.

VIÐMERKINGAR

# Fólkaatkvøðan í Hósvík, ein hóttan ímóti demokratii

**Gunnbjørn Joensen**
*Hósvík*

Eftir øllum at døma er tað demokratiska valið, sum fólkaatkvølað var, ikki góðtikin av minnilutanum, tað vil siga ja-sigarunum.

Á kunnandi fundum, sum vóru í øllum bygdunum, umfataðar av fólkaatkvøðunum um at leggja kommunurnar, sum hava arbeitt saman í kommunufelagsskapinum í Sundalagnum, varð upplýst, at kommunurnar høvdu kunnað tikið avgerð um samanlegging á einum bygdaráðsfundi, men at kommunurnar hildu tað verða rættast at fara út til borgaran við eini fólkaatkvøðu, soleiðis at borgararnir í hvørjari bygd sær skuldu sleppa at avgera, hvussu bleiv við hesi ætlan. Upplýst varð eisini, at markið var 50 prosent, t.v.s. um tað vórðu 50,1 prosent sum søgdu ja, so varð tað avgjørt, at kommunan skuldi leggja saman við hinum kommununum. Úrslitið kenna vit, tað vórðu 81 sum atkvøddu Nei og 71 sum atkvøddu Ja.

Hetta fall ikki í góða jørð hjá minnilutanum og harvið bygdaráðnum. Eftir hetta, varð lagt har út, ein skipað niðurgerðarherferð av Neisigarar fór fram í fjølmiðlunum.

1
- Hetta vóru afturhaldskreftirnar í bygdini
- Hetta var gamal egg millum Hósvók og Hvalvík frá 50 árunum
- Hann hevði kunna hugsað sær at lagt frá sær, og latið afturhaldskreftirnar sloppið til.

  Sitat: frá borgarstjóranum Jógvan Mørkøre, í útvarpinum valkvøldið

2
- Manglandi vit og skil frá Várharra
- Gomlu, negativu og ókonstruktivu bygdafólkini
- Hugsa ikki um framtíðina
- Tvørir
- Uttanfyri alt og øll
- Prumpur aftan?

  Sitat: Sonja F. Mørkøre, Sosialurin 08/05-03

3
- Gravarbakkapersónur
- Merkt av elli og klandri

  Sitat: Jonhild Hermanssen, bygdaráðslimi, í Dimmu 08/05-03

4
- Gamalt agg
- Mugu koma til fornuft

  Sitat: Eyðgerð Kruse, Sostatt 09/05-03

5
- Einki sløkkilið
- Eingin umhvørvisnevnd
- Mugu á knæ fyri at biðja um samstarv
- Koma undir umsiting

  Sitat: Jógvan Mørkøre, borgarstjóri í samrøðu við Sosialin 08/05-03

Hetta eru bet nøkur dømir um hvussu Nei-sigararnir hava verið hunddálkaðir í fjølmiðlunum seinastu dagarnar.

Eftir at Ja-sigarar hava verið úti og sett Nei-sgarar í bás, við at skírt tey at vera tvør, bøtt, gravarbakkafólk, fara umborð fyri Ja-sigarar (lærisveinar bygdaráðsins) hús úr húsi og spyrja fólk eftir undirskriftum, um at gera sum minnilutin sigur. Sjálvandi hava fólk ringt við ikki at skriva undir, tú um tú ikki skrivar undir, ja so kanst tú hava trupulleikar við at liva í hesi bygdini, tí so ert tú ein av hesu tvøru, býttu gravarbakkafólkunum.

Hetta er ein álvarslig hóttan móti demokratinum.

Fyrst hevur tú eina fólkaatkvøðu, har tú stendur einsamallur yvirfyri einum Ja ella Nei. Hetta er í trúnaði, eingin hevur krav uppá at vita, hvat ein hevur valt. Eftir hetta fer ein skipað niðurgerð av Nei-sigarunum fram í fjølmiðlunum, á ein so lágum støði, ið ikki kemmur sín líka. Ikki nokk við tað, eftir hetta fara tey út at savna undirskriftir frá fólki fyri at fáa broytt avgerðina hjá meirilutanum. Hesar undirskriftir verða savnaðar bert 3 dagar eftir fólkaatkvøðuna og kunnu samstundis brúkast til, við útlíkningshátti, at finna útav, hvør hevur sagt Nei og harvið møguligt at peika tey út, sum tey bøttu, tvøru gravarbakkafólkini.

Hetta er so langt úti, at Saddam Hussein og aðrir høvdu neyvan funnið uppá tílíkt.

Vónandi kemur ein tílík háðan og vanvirðing av hósvíkingum ikki prent aftur í fjølmiðlunum, og vit í framtíðini koma at góðtaka og virða eitt demokratiskt val her í bygdini, soleiðis um tað fellur út.

Við vón um, at tað samanhald, ið hevur verið í Hósvík ikki verður jarða, men at vit framvegis her í Hósvík kunnu koma at varðveita tann hugburð, at vit øll kunnu hava og siga okkara meining, uttan at verða forfylgd og niðurgjørd.

# ítróttur

Nr. 91 • mikudagur • 14. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fleiri eru um boðið

**Av teimum tíggju liðunum í næstbestu deildini hava seks teoretiskan møguleika at flyta upp, og óivað fara tey øll at leggja seg eftir einum plássi millum tey fýra fremstu, ið krevst fyri at fáa møguleikan**

2. DEILD BYRJAR

*Hilmar Jan Hansen*



*Hóast besta deildin oftast fær størstu umrøðuna, so er spenningurin millum tey næstbestu eisini stórur*

Hóast stórur partur av fótbóltstosinum og umrøðuni ár undan ári snýr seg um ta bestu mansdeildina, er næstbesta deildin avgjørt eisini áhugaverd. Har er tað, at biðlarnir til pláss í 1. deild eru at finna á hvørjum ári.

Verður hugt at, hvørji lið eru at finna í 2. deild í ár, so sæst skjótt, at her eru fleiri lið, sum eina ferð høvdu nógv upp á hjarta í føroyskum 1. deildarfótbólti.

TB, B71 og ÍF kenna øll søta smakkin av einum føroyameistaraheiti, hóast eftirhondini mong ár eru liðin, síðani tað gekk teimum so væl. TB vann tað síðsta av sínum seks meistaraheitum í 1987, B71 var meistari í 1989 og ÍF aftur í 1979.

Sumba var í 1. deild frá 1998 til 2000, og eingin ivi man vera um, at sumbingar heldur enn fegnir liggja framvið at sleppa uppaftur. Og so eru tað leirvíkingar, ið vóru »fast inventar« í bestu deildini frá 1982 til 1989, men síðstu ferð bara vóru uppi og vendu í 1993.

Aftur at hesum fimm, ið altso hava roynt eitt sindur av hvørjum, eru so uppflytararnir úr AB, ið kanska eru teir, ið hava dubbað seg mest til komandi kappingina í 2. deild.

Hesi seks nevndu feløgini fáa so fylgju av næstbestu manningunum í B36, KÍ, VB og B68, ið meira enn so kunnu blanda seg upp í oddastríð og alt møguligt annað, men tó ikki kunnu flyta upp, tí bestu liðini hjá feløgunum longu frammanundan eru í 1. deild.

Einasta vegin, hesi lið kunnu sleppa, er niðureftir, og tað hevur heldur ikki verið óvanligt tey seinnu árini, at tað eru júst nøkur av teimum »næstbestu«, ið ikki klára at sigla millum skerini, tá kappingin nærkast endanum.

### Hava verið nær

Fyri at venda aftur til potentiellu uppflytararnar, so er torført at spáa nakað um, hvussu teimum fer at gangast.

TB endaði aftast í 1. deild og flutti niður, og seinnu árini hevur aldursforsetin í føroyskum fótbólti gjarna lagt nógva orku í at koma uppaftur sum skjótast. Hvussu stórur munurin er á botninum í 1. deild og toppinum í 2. deild, er ringt at siga, men TB vil altíð vera eitt boð upp á ein uppflytara, og verður helst roknað sum ein av favorittunum undan kappingini.

Um tú spyrt sandoyingar, so halda teir neyvan, at hepni hevur verið við teimum síðstu tvey árini. Fyrst endaðu teir næstaftast í 1. deild í fyrraárið og taptu upp- og niðurflytingardystirnar móti Skála og fluttu niður. Og hóast B71 í fjør var næstfremst í 2. deild, tapti liðið enn eina ferð dystirnar um upp- og niðurflyting — hesa ferð móti EB/Streymi.

Einki er at ivast í, at tey í B71 vóna, at triðja ferðin verður tann besta ferðin, og at Sandoyggin aftur er við í toppinum í føroyskum fótbólti næsta ár.

Fuglfirðingar halda seg neyvan vera stórt hepnari enn B71, tí eftir at teir í 1999 endaðu eitt fýra ára skeið í 1. deild, hava teir bara verið »næstan« á veg uppaftur. Fyrst taptu teir dyst um upp- og niðurflyting móti FS Vágum í 2000, tá ÍF endaði næstfremst í 2. deild. Og bæði í fjør og fyrraárið vantaði bara eittans stigið í hjá ÍF at røkka næstfremsta plássinum, ið gevur upp- og niðurflytingardystirnar.

Slíkt er ikki stuttligt fleiri ár á rað, so tí er hetta árið óivað ein allarsíðstu kjansur, fuglfirðingar geva sær sjálvum — skulu teir ikki heilt missa vónina um at sleppa uppaftur í 1. deild.

### »The dark horse«

Sum nevnt, var Sumba fyri bara trimum árum síðani í 1. deild, og tá hevði felagið sín longsta steðg har higartil — trý kappingarár á rað. Tvey tey fyrstu árini yvirlivdu sumbingar upp- og niðurflytingardystir móti LÍF, men síðsta árið gav aftasta plássið beinleiðis niðurflyting.

Hesi bæði árini, sum síðani eru farin, hevur Sumba ikki ordiliga verið frammi í oddinum, tá kappingin er endað, men í fjør var Sumba bara eitt stig frá upp- og niðurflytingardystinum, tá fýra umfør restaðu í, men so dragnaði.

Leirvíkingar minnast sjálvandi enn tey bæði árini, tá júst sumbingar forðaðu teimum at koma uppaftur í 1. deild. Men síðani hava avrikini hjá LÍF ikki verið tað stóra at reypa av, og síðstu trý árini er liðið endað millum tey aftastu. Spurningurin er so, um LÍF hevur orku og evni at leggja seg út í oddastríðið í ár, men givið er, at tað í øllum førum krevur munandi meira av liðnum, enn tað hevur víst undanfarnu árini.

At enda er tað so »the dark horse«, AB, sum er spildurnýtt lið í 2. deild, men kortini av mongum verður roknað sum ein upplagdur kandidatur til okkurt av fremstu plássunum í næstbestu deildini.

Liðið er trimmað til hetta kappingarárið, og eitt nú í teimum báðum innleiðandi dystunum í steypakappingini eydnaðist á útivølli at basa tveimum av komandi kappingarneytunum í 2. deild, ÍF og Sumba, so AB vann sær pláss í bólkaspælinum.

### Mest rávørutilfeingi

Eftir eru so tey fýra liðini hjá B36, KÍ, VB og B68, ið mest mugu sigast at hava eina satelittuppgávu sum rávørutilfeingi hjá 1. deildarliðunum í somu feløgum.

Av teimum plagar B36 at standa seg best, meðan ársúrslitið hjá KÍ ofta er meira svingandi. VB, sum var uppflytari í fjør, kom upp móti miðjuni og fer kanska at royna eftir meira í ár. Og so fæst at síggja, um B68, sum eftir upp- og niðurflytingardystir móti grannunum úr NSÍ, fer at halda tørn í næstbestu deildini.

Hvussu er og ikki, so plaga hesi liðini, ið ikki kunnu sleppa longur upp, at dríva á fyrra partin av kappingini og kanska meira enn tað. Gjarna eru tey eisini javnan mannað við spælarum, ið hava potentiali til fyrsta lið í feløgunum, og tað kann geva eina styrki, ið spælir fleiri av hinum liðunum eitt puss av og á.

Men tá landskappingin nærkast endanum, tynnast hesi »næstbestu« liðini ofta, tí fólk verður tikið av teimum og upp í 1. deild. Er hetta eftir »strikuna«, sleppa spælararnir ikki niðuraftur.

Og so er heldur ikki ókent, at onkur av feløgunum í síðsta enda — um støðan í 1. deild loyvir tí — velja at senda nakrar frægari spælarar niður á hesi liðini, um tað kann sleppa teimum undan niðurflyting í 3. deild, tí fyri 1. deildarfeløgini hevur tað nógv at siga, at aspirantarnir til 1. deild ikki skulu finnast longur niðri enn í 2. deild.